# IN ER LÆSTUR RINGUM



*Poul Mikkelsen takkaði í farnu viku fyri seg eftir 40 ár sum limur í Fólkaflokkinum. – Fólkaflokkurin er endaður í einum óndum sirkli av blokeringum, eins og ABC-samgongan við sínum innanhýsis blokeringum elvir til ábyrgdarloysi og leti*

**FARVÆL**

mikið sum hevur viljað viðgjørt innanhýsis.

– Fleiri ferðir havi eg roynt at fingið flokkin at siga, hvat hann heldur um uppskotið, men ongantíð er málið komið til viðgerðar, einamest tí Annfinn Kallsberg, Jákup Mikkelsen og helst eisini Bjarni Djurholm hava blokerað fyri tí. Tað einasta, eg havi hoyrt, er kritikkur um, at tilfeingisgjald hevur staðið nevnt í uppskotinum. Nú grein 25-nevndin varð vald aftur, velur flokkurin so Bjarna Djurholm í nevndina, hóast hann er einasti tingmaður, sum alment hevur látursgjørt arbeiðið og ikki vildi atkvøða fyri at seta grein 25-nevndina. Tað fataði eg sum eina hevndaratsókn ímóti mær aftur fyri stríðið í sambandi við kommunalreformin og skúlareformin, sigur Poul Michelsen.

Poul Michelsen hevur eisini verið misnøgdur við, at fíggjarlógin ferð eftir ferð hevur verið pettað sundur í fíggjarnevndini, hóast landsumsitingin hevur sakkøn fólk at gera fíggjarlógina á nøktandi hátt. Hann hevur verið ímóti at lata skattalættar, tá búskapurin hevur verið yvirupphitaður, hevur havt ilt av bondska tónanum úr gamla Dagblaðnum, sum viðhvørt enn hoyrist í løgtinginum, og so hevur hann verið ímóti handfaringini av aðalstjórasetanini í Uttanríkisráðnum, har Jørgen Niclasen fekk sín mann settan í sessin.

– Tilsamans hevur ónøgdin verið stór, men eg gevi ongum øðrum skyldina. Eg kundi bara ikki standa inni fyri hesum longur. Fólkaflokkurin er endaður í einum óndum sirkli av blokeringum, eins og ABC-samgongan við sínum innanhýsis blokeringum elvir til ábyrgdarloysi og leti. Framdriftin í samfelagnum er ov lítil, og boðið upp á morgindagin er ikki til staðar. Mín útmelding er eisini eitt uppróp til allar politikarar um at finna útav at samstarva tvørtur um øll floksmørk, so vit kunnu koma longri fram á leið. Eg fari so at samstarva við øll fyri at fáa teir meirilutar, sum eru neyðugir fyri samfelagið, sigur Poul Michelsen.

## Ongin tíð

Bæði Annfinn Kallsberg og Jørgen Niclasen hava nevnt, at Poul Michelsen er ótolin politiskt, og at hetta er orsøkin til, at hann er komin tvørt fyri í Fólkaflokkinum. Hetta vil Poul Michelsen ikki hoyra talan um.

– Kommunalreformurin hevur verið á veg í 30 ár, og so sita menn enn og siga, at nú skulu vit bara taka tað róligt. Tað haldi eg ikki, vit skulu gera, tí vit eru í eini kreppu, og tá má ferð setast á at loysa trupulleikarnar í samfelagnum. Vit mugu taka avgerðir. Fólkaflokkurin er kanska tann mest konservativi flokkurin av øllum, og tað hóskar ikki saman við tí, hann eigur at standa fyri. Hann skuldi staðið fyri framdrift. Tað mátti sagt eitt sindur, at vinnulívsmenninir í flokkinum hava markerað sína ónøgd seinastu dagarnar, meðan nakrir skúlalærarar leggja seg afturá og siga, at alt gongur fínt. Tað ger tað bara ikki, sigur Poul Michelsen.

*ua@sosialurin.fo*